## Nógv sóu “brotssparkið”

Ein av myndarøðunum, sum um vikuskiftið kundi síggjast á sportalinum, var nógv umrødda brotssparkið, sum Víkingur fekk í Klaksvík. Har hevði Jóannes N. Poulsen tikið eina myndarøð í støðuni, sum fekk dómaran at floyta, og hesa vildu nógv síggja. Í øllum førum hevur vitjunartalið á sportalinum ongan tíð verið somikið høgt, sum tað var í seinastu viku sambært vevmátingarlistanum.



## So tapti Valur

Sigursrøðin hjá Vali í bestu íslendsku kvinnudeildini endaði sunnukvøldið. Eftir at hava vunnið 14 ferðir upp í slag taptu Randi Wardum og liðfelagarnir á útivølli móti nærmastu kappingarneytunum úr KR, sum nú eru trý stig aftan fyri oddaliðið. Við einum sigri í kvøld kundi Valur annars tryggja sær meistaraskapin, tá tað er lítið sannlíkt, at KR hevði fingið betri málmun. 25 mál eru í løtuni á muni. Í staðin má Valur vinna tveir av trimum dystunum, sum resta í.
KR vann 3-2, og Randi Wardum vardi málið hjá gestunum allan dystin.

# Sviar í øðini um sjónvarpið

**Peter Jonsson hjá svenska sjónvarpinum spurdi áhaldandi Susanne Kallur um fall hennara, og tað hevur fingið øði í svensku hyggjararnar**

OL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av stóru svensku gullvónunum fall, tá Susanne Kallur datt um fyrstu gyrðingina í hálvfinaluni í 100 metra forðarenning fyri kvinnur.

Tárini fingu sjálvandi frítt at fara hjá 27 ára gomlu kvinnuni, sum hevur hetjustatus í Svøríki, og tí fekk tað øði í hyggjararnar, tá Peter Jonsson hevði hug at spyrja dekan ov ofta »hvussu keðiligt hetta kendist«.

Síðani hetta hava lesarabrøvini móti sjónvarpsmanninum verið nógv í tali, og í flestum av hesum verður kravt, at maðurin verður sendir til hús her og nú.



*Her fall ein tann størsta OL-vónin hjá svium. Susanne Kallur heilkiksaði, tá hon skuldi fara um fyrstu gyrðingina í 100 metra forðarenning*

**Dómarabókin**

| Feløg | | GK | RK | Stig |
|---|---|---|---|---|
| ÍF | | 36 | 5 | 51 |
| B71 | | 30 | 5 | 45 |
| Víkingur | | 40 | 1 | 43 |
| KÍ | | 32 | 2 | 38 |
| B68 | | 35 | 1 | 38 |
| Skála | | 32 | 1 | 35 |
| EB/S | | 30 | 1 | 33 |
| B36 | | 26 | 2 | 32 |
| HB | | 25 | 1 | 28 |
| NSÍ | | 24 | 1 | 27 |
| **Spælarar** | | | | |
| Símin Hansen | B71 | 3 | 3 | 12 |
| Hans Jørgen Djurhuus | Víkingur | 8 | 1 | 11 |
| Høgni Madsen | ÍF | 6 | 1 | 9 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 6 | 1 | 9 |
| Gudmund Nielsen | B71 | 5 | 1 | 8 |
| Marni Djurhuus | EB/S | 8 | 0 | 8 |
| Vali Miela | Skála | 8 | 0 | 8 |
| Balazs Sinko | ÍF | 4 | 1 | 7 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 7 | 0 | 7 |
| Alexander Jovevic | ÍF | 0 | 2 | 6 |
| Andras Gango | ÍF | 3 | 1 | 6 |
| Jan Andreasen | KÍ | 6 | 0 | 6 |
| Andreas Lava Olsen | Víkingur | 6 | 0 | 6 |
| Rodrigo | KÍ | 2 | 1 | 5 |
| Poul N. Poulsen | Skála | 2 | 1 | 5 |
| Klæmint Matras | B36 | 5 | 0 | 5 |
| Tamas Nagy | B36 | 5 | 0 | 5 |
| Nenad Stankovic | NSÍ | 5 | 0 | 5 |
| Óli Hansen | NSÍ | 5 | 0 | 5 |
| Arnhold Berg | Skála | 5 | 0 | 5 |
| Pætur Dam Jacobsen | Skála | 5 | 0 | 5 |
| Atli Gregersen | Víkingur | 5 | 0 | 5 |
| Magnus Skoralíð | Víkingur | 5 | 0 | 5 |
| Niclas Niclasen | Víkingur | 5 | 0 | 5 |

Í yvirlitinum telur gult kort 1 stig. Reytt kort telur 3 stig




*Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarum, sum stóðu seg best í 18. umfarinum av Formula-deildini*